# Sambandsflokkurin rennur aftur undan ábyrgd!

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Tað er rættiliga sjónligt, at leiðslan í Sambandsflokkinum saman við øðrum, sum standa flokkinum nær, hava lagt eina ætlan, har alt, sum ikki hóvar veljarunum serliga væl, tað skal skuldskrivast hinum báðum samgonguflokkunum.

Onkur heldur kanska, at hetta er gott politiskt arbeiði, men tað er sera ódámligt, serliga tá hugsað verður um, at sami flokkur hevur løgmann, sum er leiðari hjá samgonguni.

Seinastu tíðina hava verið fleiri hendingar, har leiðandi fólk í Sambandsflokkinum tváa sínar hendur og geva øllum øðrum skyldina fyri tað, sum hendur.

Tað kann væl vera, at hetta kann geva nøkur bílig politisk stig her og nú, men tað hevur ikki verið vanligt í Føroyum, at slíkt gevur í seinasta enda. Undanstøkking hevur ongantíð verið ein dygd her á landi.

Vit kunnu taka nøkur tilvildarlig dømi hesar síðstu dagarnar:

**1.** Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna sigur í fjølmiðlunum, at tað at mótrokna fyritíðarpensjonistar við 25% frá fyrstu krónu, er henni ein herskin biti, men tað er ein politiskt semja. Hvør skal siga, at hatta eri eg bukað til, og løgmaður hevur als onga viðmerking!

**2.** Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður vil frá tingsins røðarapalli hava at vita, hvør tað er, sum hevur skotið hetta upp viðvíkjandi fyritíðarpensjónum, hóast hansara egni flokkur umsitur málið. Harvið er sjálvandi ivin sáddur, og løgmaður sigur framvegis einki!

**3.** Magni Laksafoss, løgtingsmaður (sum altíð í andstøðu til samgonguna) gevur Fíggjarmálaráðnum av grovfíluni fyri Ólavsøkupakkan, tí hann er ov lítið virkisskapandi. Hesin búskaparligi strategurin hjá Sambandslokkinum (sum flokkurin hevur sett til at umsita mentamál) er náðileysur í sínum kritikki av øllum øðrum. Hetta er so yvirskriftin nakrar dagar, og løgmaður hevur onga viðmerking!

**4.** Edmund Joensen, løgtingsmaður (og hin andstøðutingmaðurin í samgonguni) gevur samgonguni allari ein frammaná, men tó snildisliga serliga Fíggjarmálaráðnum, Uttanríkisráðnum, Mentamálaraðnum og Fiskimálaráðnum. Hesi ráð verða umsitin av hinum flokkunum í samgonguni og ikki Sambandsflokkinum. Løgmaður hevur framvegis onga viðmerking!

**5.** Lisbeth Petersen, fyrrverandi formaður Sambandsfloksins gevur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismanni skyldina fyri og krevur hann eftir einari frágreiðing, at Demokratia í Ólavsøkuuppskotinum er skorið niður í eina helvt, hóast Sambandsflokkurin umsitur javnstøðu í landsstýrinum!

Tann vakni eygleiðarin hugsar sjálvandi, at Sambandsflokkurin er illa fyri í landsstýrinum, um tað er so, at onnur gera arbeiðið fyri tey. Tann árvakni eygleiðarin hugsar eisini, at manningin hjá Sambandsflokkinum í landsstýrinum má vera sera veik, tá hon letur slíkt um seg ganga.

Men lyklapersónarnir aftan fyri Sambandsflokkin halda ivaleyst, at fólk gloypa agninum, at tað eru øll onnur enn tey, sum hava skyldina. Men her rokni eg við, at onkr mistekur seg stórliga.

Slík framferð ger so í hvussu er, at møguligar leys missil gerast uppaftur leysari og skjóta í allar ættir. Tá er stevið í samgonguni farið, og spurningurin er, um man yvirhøvur kann rokna við Sambandsflokkinum.

## Yvirlýsing frá Eldradegnum 2009

Eldradagurin 2009 heitir við hesum á landsstýri og løgting at taka aftur verandi pensiónsspariuppskot í Ólavsøkupakkanum 2009, tí tað máar støðið undan fólkapensiónsskipanini og vendir sosialt skeivt.

Sum er, er nettopensiónin undir fátækramarkinum hjá OECD. Pensionistar ið bert hava lága inntøku aftur at pensiónini, tola ikki at missa burtur av inntøkuni, og er mótrokning við 25% frá fyrstu krónu tí púra burturvið.

Higartil í ár er longu nógv tikið frá pensionistunum. Hetta rakar serstakliga meint hjá pensionistum, sum longu framman undan eru ringast fyri. Í staðin fyri at taka burtur av pensiónunum eiga landsstýri og løgting heldur beinan vegin at hækka útgjaldið úr Samhaldsfasta, sum politisku flokkarnir áður hava lovað.

Vit heita á politiska myndugleikan um saman við umboðum fyri okkum pensionistar at taka spurningin um framtíðar pensiónsskipan til víðari viðgerð og vísa størri atlit til fíggjarligu støðuna hjá pensiónistunum heldur enn til landsskassan

***Soleiðis samtykt av áleið 400 pensionistum á Eldradegi í Nesvík 08.08.2009***

# Fiskdagar og tilmælir

EYÐUN HANSEN

Vestmanna

Nú skulu fiskidagar aftur ásetast og søgan er tann sama. hvørt ár skerjingar frá 30-100% Frá fiskifrøðingnum?

Meiningin við fiskidagaskipani var at laga dagarnir eftur fiskarínum. Meira fiskur at fáa, skuldu meira fiskidagar blíva. Hví bleiv hetta ikki so?

Upsin er ein semipelagiskur fiskur sum er ca 70% av tíðini uppi í sjónum og við øllum stongdum leiðum, er ongin møguleiki at yvurfiska nakran upsa. Um so fiskidagatalið kemur upp aftur á tað sama sum bleiv byrja við, men eftur upsafiskarínum sum var fra 95 til nu skuldu dagarnir 3 ferð sum teir vóru fra byrjan men har sum for nogv er lurta eftur fiskifrøðingnum er galið allastaðni.

Seinast í 80 ium minkaði alt fiskaríð.tað var sagt at alt var uppfiska,men teir sum sigldu og sóðu ekkoloddi uppdagaðu at ætið bleiv vekk áðrenn fiskurin rímdi og tað gingu nøkur á við vánaligum fiskaríði so mitt í 90inum kom ætið og fiskurin aftur.

Nøkur folk sum hava verið í norra koma heim og rópa upp fyri polittikarum og fjølmilum um at tey hava gingi 3 ár i skúla og eru blivin serfrøðingar.Tey flestu trúgva uppá hesi fólk tí tey vita ikki annað.

Magnus heinason gerð yvurlits trolingar sum hesi fólk ornað fyri. Lemmar breitlar trol posi umborð so avstað. Tað hava gjørt tað í umleið 25 ár. Hvussu sær út við ætt vindi troli og lemmun o.a ?. Vita tey betur enn øll onnur tey kalla seg sjálvi serfrøingar. Vita teir betur enn fiskimaðurin?

Eg havi roynt at fingi upplísningar frá folki sum siglur við magnusi,tey vilja ikki úttala seg.

Men fólk sum hava siglt við siga at tað er onki skil á útgerðini sum teir brúka til yvurlitstrolingar.

Ja útgerðin hjá Magnus heinason er ein stórur feilur.

Tøl frá yvurlits trolingunum eru óreel. Hví far magnus meira tosk og hýsu enn upsa? tá er okkurt galið tí øll vita av at støða er øvugt.

Gamlir og skeivur lemmar sum ongin sum ætlar at dríva fiskarið vildi fari út at fiska við. Men tað er nokk ikki meiningin at magnus skal fá nakra fisk. frøðingarnir skullu bara skerja.

Nú í nøkur ár eru lundapisurnar deygar í hungri og toskurin er farin at leita sær arastæðni eftur føði tað er tí ongin nebbasild hevur verði. Nú er meira av nebbasild og toskurin ferð at koma aftur.

Fyri 5 árum síðan var tað bara smáður upsi eina tíð tá bleiv rópt hart um at nú var alt uppfiska 4 mánaðir seinri bleiv tann smáði upsin vekk og tað bleiv nógvur stórur upsi at fáa tá segði ongin naka hvar tann smái upsin for og hvar tann stóri upsin kom fra.

Allir føringar hava hoyrt og lisi fleiri 100 ár aftur í tíðini um fiskaloysið og hungursneyð og tá var ongin yvurfisking tad var ikki sami fiskireiðskapur sum nú men teir fyngu fisk tá ið fiskur var og ongan fisk ta íð onki var at fáa.

So hava frøðingarnir rætt er øll føroya søga bygd uppá eina lygn. Politikararnir mugu taka støðu til hvørjum teir skulu trúgva.???

Í Føroyum var nær við. Men tað var EIN MAÐUR í Tjóðveldinum sum hevði skil fyri tí sum hann gjørdi og bjargaði tí stóru skandaluni.

# Fyritíðarpensjónin kann fáa lemjandi afturstig

LEILA SOLMUNDE

forkvinna í MBF



Beint áðrenn tingið fór í summarfrí tók eitt samt ting undir við, at seta í gildi ST sáttmála, sum skal tryggja fólki við breki javnbjóðis rættindi í samfelagnum. Hetta stigið fegnaðist vit um í MBF, tí so sømir tað seg einum framkomnum landi.

Við hesum sáttmálanum sum grundarlag, sóu vit fram til eina tilgongd, at geva øllum borgarum landsins líka rætt og javnbjóðis møguleikar.

Nú ein nýggj tingseta er byrjað, hevur landsstýrið lagt ein sokallaðan Ólavsøkupakka fram á ting. Eitt av málunum, sum er komið á løglistan, fær meg at standa spyrjandi, málið eg sipi til, er ætlanin at gera broytingar í lógini um fyritíðarpensjón.

Verður henda ætlan til veruleika, so verður tað ikki til tað betra, so tvørtur í móti, og er als ikki í tráð við nýsamtykta ST sáttmálan.

MBF hevur í nógv ár arbeitt við at fáa politiska myndugleikan at fremja ábøtur á lógina um fyritíðarpensjón. Hetta arbeiði hevur verið drúgt og til tíðir møtimikið. Men í 2007 legði táverandi landsstýrismaður í almannamálum Hans Pauli Strøm uppskot fram á ting, sum bøtti munandi um fyritíðarpensjónina. Lægsta fyritíðarpensjón skuldi burtur eftir 2 árum og mótrokningsprosentið varð broytt.

Ætlaða uppskotið sum nú er stungið í kortið, sorlar sundur alt arbeiði sum er gjørt á økinum, og gevur fyritíðarpensjónini eitt lemjandi afturstig

Eg skal taka eitt dømi um hvussu ein persónur er fíggjarliga fyri um hann fær tillutað miðal fyritíðarpensjón. Eg kann leggja afturat at tá tú hært miðal pensjón hevur tú mist 2/3 av tíni arbeiðsorku.

Miðal pensjón er áðrenn skatt fyri stakan persón uml. 117.000 kr og giftan uml. 103.000 árliga. Henda upphædd skal kompensera fyri tí mistu arbeiðsorkuni. Eftir er so 1/3 arbeiðsorka, sum tú kanst brúka um møguleiki er at finna okkurt at gera sum viðkomandi orkar at átaka sær. Tú kanst forvinna upp til uml. 80.000 kr áðrenn tú missir av pensjónini.

Um tú fert yvir tað missir tú 30 kr fyri hvørjar 100 tú tjenar. Ein annar møguleiki sum Almannastovan hevur er, at um fólk forvinna størur upphæddir við síðuna av pensjónini, so kann Almannastovan endurskoða støðuna, um tú hevur størri arbeiðsorku enn fyrr mett, ella um sjúkan broytist til tað betra, og tá kann pensjónin leggjast still sum tað verður kallað.

Uppskotið sum nú er komið á løglistan er ógvuliga ódámligt. Tú skalt mótroknast við 25% frá fyrst tjentu krónu. Allir fyritíðarpensjonistar skornir yvir ein kamb, óansæð um tú fært hægstu ella miðal pensjón ella um tú fært lønarískoyti frá einum vardum verkstaði.

Um vit enn halda okkum til miðal fyritíðarpensjonistin, so hevur hann ikki javnbjóðis møguleika at forvinna við sínum restarbeiðsførleika, tí tá hann fer at arbeiða so betalir hann fyrst skatt eins og øll onnur sjálvandi, MEN harumframt missir hann 25% av pensjónini, sum skal kompensera fyri tann partin sum er óarbeiðsførur.

Her er okkurt heilt galið í hugsunarháttinum hjá tí sum hevur gjøgnumhugsað uppskotið, tú uppskotið leggur upp til at ikki øll verða líka fyri lógini.

Fólk sum fáa fyritíðarpensjón, tey gjalda skatt sum øll onnur í landinum av síni pensjón, og gjalda eisini skatt av tí sum møguleiki er at forvinna við síðuna av pensjónini. Hetta eru inntøkur sum landið fær, og sum skjótt kunnu minka um eitt tílíkt uppskot kemur ígjøgnum. Tí er hetta uppskotið ikki arbeiðsfremjandi heldur skerjandi.

Eg fari tí inniliga at heita á landsins myndugleikar at taka uppskotið aftur.